# Munur á ferjum …



*Flaggskip føroyingar í 1975 og flaggskip føroyinga í 2003. Her er sanniliga munur á ferjum…*
*Mynd: Árni C. Joensen*

**Stórur munur er á nýggja flaggskipi føroyinga, Norrønu, og Smyrli, ið sum flaggskip føroyinga í 1975 breyt upp úr nýggjum við sigling í Atlantshavi**

FLAGGSKIP
*Eirikur Lindenskov*

Mong vóru tey, sum ógvaðust, tá Smyril á sumri í 1975 stevndi inn á Havnarvág.

Útróðrarmenn høvdu blokkerað havnina í Havn í nakrar dagar, so Smyril kom ikki á Havnina á fyrsta túrinum – hann slapp bara at bryggju á Tvøroyri. Men eftir fyrstu uttanlandsferðina til Noregs, stevndi hann so loksins á Havnina, og tá var mikil móttøka.

Fólk tóku til, hvussu stórt hetta skipið var, og tá Ritan sigldi fram við Smyrli, sást rættuliga, hvussu STÓRT skipið var.

Á Strandferðsluni minnast tey væl orðini hjá Jógvan Arge, útvarpsmanni, tá portrið fór upp á fyrsta sinnið undir havnarskrivstovuni. Hann segði, at nú fór portrið upp til tað forjettaða landið, og at bildekkið var so stórt sum ein heilur fótbóltsvøllur…

At dimensiónirnar á nýggju Norrönu eru munandi størri enn á Smyrli, er myndin á hesi síðu, sum Árni C. Joensen hevur tikið, týðuligt prógv um.

Men fyri at samanbera, so fáa vit her nøkur fakta um Smyril og um Norrönu:

**Norröna:**

| | |
|---|---|
| Longd: | 164,5 m |
| Breidd: | 30 m |
| Deyðvekt: | 4.300 t |
| Bruttotonnaga: | 36.000 brt |
| Ferðafólk: | 1.482 |
| Bilar: | 800 (ella 120 trailarar) |
| Høvuðsmotorur: | 30.000 Hk |
| Manning: | 130 |
| Prísur: | 700 mió krónur |
| Byggiár: | 2003 |

**Smyril:**

| | |
|---|---|
| Longd: | 87,52 m |
| Breidd: | 16,52 m |
| Deyðvekt: | 4.300 t |
| Bruttotonnaga: | 2.430 brt |
| Ferðafólk: | 800/495 |
| Bilar: | 110 |
| – | |
| Høvuðsmotorur: | 4 X 2.520 Hk |
| Manning: | 130 |
| Prísur: | umleið 25 mió |
| Byggirár: | 1969 |






## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
sum varð sýnt okkum,
tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Jóanis Wardum**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prestin Sonju Klein fyri vøkru orðini.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og kórið.
Tøkk fyri kransar og blómur.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.
Hjartans tøkk øll somul

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini v/ familju**




